# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Kommunisman var mær dýr. Tað sæst nú, og tí líði eg av hjartatrupulleikum í dag*

*Lech Walesa*

# Koyrdi Madeleine tað kvøldið hon hvarv

**Ein portugisiskur hýruvognsførari sigur, at hann hevði Madeleine McCann í bili sínum tað kvøldið, hon hvarv**



*Madeleine McCann hvarv í Portugal fyri skjótt 10 mánaðum síðani*

- Tað var Madeleine. Hon var saman við trimum monnum og einari kvinnu. Kvinnan var ljóshærd, og ein av monnunum líktist Robert Murat, sigur hýruvognaførarin við eitt portugisiskt blað.

Tann 67 ára gamli Antonio Castela ringdi til løgregluna longu dagin eftir, at Madeleine hvarv. Hann greiddi løgregluni frá, at hann var heilt vísur í, at hann hevði havt ta horvnu gentuna í bili sínum kvøldið fyri. Frágreiðing hansara bleiv tó ikki tikin í álvara, tí hon samsvaraði ikki rættiliga við tað, sum foreldrini hjá Madeleine McCann høvdu sagt við løgregluna.

Antonio Castela sigur, at tey fýra fólkini við smágentuni steðgaðu sær um áttatíðina um kvøldið við Monte Gordo. Tey bóðu hann koyra til eitt hotell í Algarve, har tey fóru úr bilinum. Hesin túrurin tók umleið eitt korter. Antonio Castela sigur, at hann sá fólkini fara í ein bláan jeep, og at tey koyrdu avstað.

Smáar tveir tímar seinni, klokkan tíggju um kvøldið, boðaðu Garry og Kate McCann løgregluni frá, at Madeleine var horvin.

### Kendi hana aftur

Portugisiski hýruvognsførarin er sannførdur um, at tað var Madeleine McCann, sum var í bili hansara um kvøldið tann 3. mai í fjør. Hon var í ljósareyðum náttklæðum, og ein av monnunum sat undir henni alla tíðina.

- Tá eg sá tíðindini í sjónvarpinum og myndina av gentuni, kendi eg hana aftur beinanvegin, og segði við konu mína, at hasa gentuna hevði eg í bilinum kvøldið fyri, sigur Antonio Castela.

Hann greiðir frá, at hann fór til hotellið, har hann hevði sett gentuna og fýra fólkini av, tí hann helt, at kanska hevði hotellið myndatól, sum høvdu avmynda gentuna og tey fýra. Tað vísti seg, at hotellið hevði myndatól, men at tað var í ólagi.

- Eg segði løgregluni frá øllum, men teir tóku ikki frágreiðing mína í álvara og søgdu, at eg mátti hava mistikið meg. Men eg eri vísur í, at tað var Madeleine, sigur Antonio Castela.

### Bretskur bilur

Hýruvognsførarin minnist eisini, at tá hann steðgaði uttan fyri hotellið, spurdi ein av monnunum á enskum máli, hvussu nógv hann skuldi hava fyri túrin. Hann legði eisini til merkis, at jeepurin, sum tey fóru í, hevði bretskar nummarplátur.

Í hesum viðfangi kann verða nevnt, at seinasta vikuskiftið boðaði ein maður í Bretlandi løgregluni har frá, at hann hevði havt vitjan av einum pari, sum skuldi keypa nakrar gamlar møblar frá sær. Tey bæði fólkini høvdu eina smágentu við sær, at maðurin er sannførdur um, at tað var Madeleine McCann.

## STUTT SAGT

### Gíslar sluppu leysir

Uppreistrarrørslan FARC í Kolombia hevur latið leys fýra fólk, sum høvdu verið gíslar hjá rørsluni í seks ár. Eftir samrøður millum FARC og Reyða Kross vórðu gíslarnir latnir umboðum fyri Reyða Kross og myndugleikarnar í Venesuela. Ein talsmaður hjá Reyða Krossi sigur, at gíslarnir vórðu sleptir á einari fløtu har suðuri í Kolombia sum avtalað, og har tóku umboð fyri venesuelsku myndugleikarnar ímóti teimum og fluttu teir til Venesuela.

### Mafian samstarvar

Ein frágreiðing hjá italsku løgregluni vísir, at mafian á Sisilia, Cosa Nostra, samstarvar við mafiuna í New York, og at hetta samstarv er økt tey seinastu árini, eftir at teir báðir felagsskapirnir vóru í einum blóðugum stríði til fyri umleið 20 árum síðani. Frágreiðingin sigur, at Cosa Nostra sendir reguliga sínar fremstu menn yvir um Atlantshavið at verja sína støðu á tí kriminella marknaðinum har. Eitt nú avdúkar frágreiðingin, at mafian á Sisilia og mafian í New York hava eftirlit við fleiri amerikonskum byggifyritøkum og matvøruhandlum.

### Sarkozy minni avhildin

Franski forsetin, Nicolas Sarkozy, er ikki so væl umtóktur ímillum sínar landsmenn longur. Ein nýggj meiningakanning hjá tíðarritinum Valeurs Actuelles vísir, at bara 33 prosent av teimum spurdu eru nøgd við forsetan og avrik hansara. Heili 61 prosent siga, at tey hava ikki álit á manninum ella politikki hansara. Undirtøkan hjá franska forsetanum hevur verið minkandi síðani ársskiftið, og hon er minkað sera nógv síðani í fjør, tá umleið 60 prosent søgdu hann vera tann rætta forsetan. Kanningin hjá Valeurs Actuelles vísir, at nógvir fransmenn eru midnøgdir við verandi fíggjarpolitikkin.

# Níggju milliónir mintust Hussein

**Irakski býurin Kerbala hevur havt óvanliga nógv vitjandi teir seinastu dagarnar**

Fyri 40 døgum síðani varð shiamuslimski presturin Hussein myrdur í Irak, og teir seinastu dagarnar hava shiamuslimar í milliónatali verið í tí heilaga býnum Kerbala fyri at minnast tann myrda prestin.

- Vit hava havt umleið níggju milliónir pílagrímar í Kerbala, sigur ein talsmaður hjá irakska herinum við AFP-tíðindastovuna, og guvernørurin í býnum sigur, at tað hava ongantíð verið so nógv fólk í býnum fyrr.

Myndugleikarnir hava sett umleið 50.000 løgreglumenn til at forða fyri yvirgangi. Seinasta sunnudag brast ein bumba í Kerbala, og tá doyðu meiri enn 60 pílagrímar, skrivar AP.



*Níggju milliónir pílagrímar mintust Hussein prest*